

Brúkarasamtakið er farin á alnetið við sínum virksemi.

# Brúkarasamtakið í sving

**Brúkarasamtakið setir nú meira ferð á virksemið við faldara og nýggjari heimasíðu**

BRÚKARASAMTAK
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Føroyska brúkarasamstakið hevur nú fingið eina heimasíðu. Samtakið, sum enn ikki eigur nógv ár á baki, setir við heimasíðuni og einum faldara meira ferð á virksemið hjá sær. Heimasíðan er at finna á adressuni brukarasamtakid.fo. Nýggi faldarin sigur eitt sindur um, hvat Brúkarasamtakið tekst við í sínum dagliga virksemi. Felagið er sjálvboðið, og fremsta uppgávan hjá felagnum er at virka fyri, at politiski myndugleikin røkir sínar skyldur við at seta í verk brúkaralóggávu og brúkarastovn.

– Brúkarasamtakið arbeiðir í løtuni við einum tiltaki, ið verður knýtt at aðalfundinum fyrst i oktober. Ætlanin er at seta ljóskastaran á háttin, ið marknaðarføring verður framd í Føroyum. Møguliga við einum paneli við viðkomandi fólki, sigur Petur í Gong, formaður, í tíðindaskrivi.

## Nýggj nevnd

Tað var herfyri, at Petur í Gong varð valdur til formann fyri Brúkarasamtakið. Nevndin umskipað seg tá. Fyrrverandi formaðurin, Ingun Simonsen, er farin í onnur lond í útbúgvingarørindum, og hon er tískil ikki longur knýtt at nevndini í samtakinum. Kristina Samuelsen er næstformaður og Gunnleivur Dalsgarð er kassameistari. Brúkarasamtakið hevur heitt á Eriku Hayfield um at hjálpa til, og tað hevur hon játtað. Orsøkin er, at Erika í løtuni leggur síðstu hond á sína Ph.d. ritgerð innan forbrúk, skrivar Brúkarasamtakið.




## Hevur tú tað, sum er líka umráðandi sum hetta..?

Skalt tú út í heim at ferðast, er tað av alstórum týdningi, at tú hevur røttu ferðatryggingina. Hetta kunnu vit bjóða tær.

Tú kanst fáa ferðatryggingina sum ískoyti til familjutryggingina, so tú sleppur undan at hugsa um ferðatrygging, hvørja ferð tú ella húskið skulu út at ferðast.Tú kanst eisini fáa eina vanliga ferðatrygging til ta einkultu ferðina.

Vit bjóða fylgjandi tryggingar:
- Ferðatrygging sum ískoyti til familjutrygging
- Vanliga ferðatrygging
- Vinnuferðatrygging
- Langtíðarferðatrygging
- Avboðstrygging

Fá eina ferðatrygging frá Trygd á tíni ferðaskrivstovu, hjá Trygd ella í eini av deildunum hjá Føroya Banka.

*Ikki bara tryggingar, men eisini trygd*

TRYGD

Gongin 7 Postboks 44 110 Tórshavn Tel 35 81 00 Fax 31 72 11
e-mail: trygd@trygd.fo www.trygd.fo

petur & petur • 320870


# Endurnýtslukalendari í hvørt hús

Í hesum døgum verður kalendari borin út í hvørt hús í Tórshavnar kommunu. Kalendarin vísir, nær grøna ílatið til pappír og papp verður tømt. Kommunan er býtt upp í 24 øki og ein kalendari er gjørdur til hvørt øki sær. Frámerki er við ein dag hvørja sættu viku, soleiðis at kalendarin vísir, nær ílat hjá tí einstaka húskinum verður tømt.

Tað er á leið eitt hálv ár síðani, at teir flestu av borgarunum í høvuðsstaðnum fingu íløt at skilja burturkastið í. Í vikunum 35 og 50 verður tann klári posin til vandamikið burturkast heintaður saman við vanliga burturkastinum.

**-HR**

# Listastevnan stílar høgt

Eftir at blaðið fór til prentingar, helt stýrið fyri Listastevnuna tíðindafund um ársins stevnu. Í blaðnum í morgin verður meira at lesa um stevnuna.

Stýrið fyri Listastevnuna letur onga iva vera um, at satsa verður høgt í ár. Tey halda sjálvi, at skráin er sera spennandi og forkunnug.

Óivað størstu nøvnini eru Kiri Te Kanawa og Jethro Tull. Tey umboð helt hvør sína grein innan tónleikin. Men tað er ikki bara at biðja lova sær hjá fyrireikarunum, tá boð verða send eftir Kiri Te Kanawa; hon krevur nevniliga heilt ómetaliga nógv av fyrireikarunum. Millum annað skal hon ikki koma í nánd av einari sigarett.

Føroysku høvuðsnøvnini, um vit kunnu siga soleiðis, vera Teitur Lassen og Eivør Pállsdóttir. Listastevnan verður 6. til 15. august.

**-HR**


## Maskinførari

Søkt verður eftir royndum maskinførara.
Byrjað verður eftir avtalu.
Tlf. 315060/585000

J&K

e-mail JKP@JKP.FO


ítróttur

Nr. 136 • týsdagur • 20. juli 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# KÍ-kvinnurnar í eldin

**Í dag fara kvinnurnar hjá KÍ í eldin, tá ið tær skulu spæla fyrsta dystin í bólkaspælinum í UEFA-Cup ímóti ukrainska Metalist Kharkov.**

KÍ-KVINNUR Í ALTJÓÐA DYSTI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Aftur í ár fara kvinnurnar hjá KÍ at royna seg í altjóða fótbólti. Hesaferð skulu tær í eldin í Pólandi, har tríggir dystir skulu leikast upp á fimm dagar.

## Truplir dystir

Tað er einki at ivast í, at talan er um tríggjar truplar dystir hjá klaksvíkskvinnum. Fyrsti dysturin, sum verður leiktur í dag, er, sum áðurnevnt, ímóti ukrainska Metalist Kharkov. Hósdagin verður leikt ímóti heimaliðnum Wroclav úr Pólandi, meðan tann seinasti dysturin á ferðini hjá KÍ verður leygardagin. Tá er mótstøðuliðið Cardif City úr Wales, og tað er helst í hesum dystinum, at kvinnurnar hjá KÍ hava besta møguleikan. Føroyska kvinnulandsliðið hevur áður við hepni roynt seg ímóti Wales, og tí eigur møguleiki at verða fyri, at okkurt gott spyrst burtur úr hjá KÍ í hesum dystinum.

Hinvegin er ikki nógv at frætta um, hvussu sterk hini bæði liðini í bólkinum eru, men lítið man verða at ivast í, at talan er um tvey sterk lið, ið óivað verða torfør hjá klaksvíkskvinnum at basa. Hinvegin hava royndirnar hjá KÍ-kvinnunum úti í Europa víst, at tær avgjørt kunnu verða við, og eingin orsøk er hjá teimum at óttast mótstøðuliðini. Sosialurin fer sjálvsagt at fylgja við í, hvussu tað gongur hjá klaksvíkskvinnunum í Pólandi.



*KÍ-kvinnurnar avmyndaðar á bryggjuni í Klaksvík, áðrenn leiðin gekk til Pólands, har tríggir altjóða dystir eru á skránni.*

# Róðrarhagtøl á alnótini

**Havnar Róðrarfelag hevur á heimasíðu síni gjørt ein hagtalsgrunn, har til ber at síggja øll róðrarúrslit heilt afturi frá 1973.**

RÓÐRARHAGTØL
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Nú ber til hjá øllum róðraráhugaðum at fara og leita í gomlum úrslitum á alnótini. Nakrir ungir mans innan Havnar Róðrarfelag hava nevnliga í eina tíð arbeitt miðvíst við at savna øll róðrarúrslit heilt afturi frá 1973 og fram til í dag i ein sonevndan hagtalsgrunn.

## Hvør eigur metini

Eitt tað mest áhugaverda við nýggja hagtalsgrunninum hjá Havnar Róðrarfelag á heimasíðu felagsins, www.drekin.fo, er, at nú ber til at samanmeta tíðir, og eisini kann staðfestast, hvør eigur tey ymisku metini.

Grunnurin er soleiðis býttur upp, at til ber at síggja, hvør hevur bestu tíðirnar á teimum ymisku róðrarplássunum innan tær ymisku bátastøddirnar. Til dømis kann staðfestast, at tað framvegis er Skálabáturin, ið eigur metið hjá 10-mannaførum á Ólavsøku, sum teir settu í 1992, og at Havnarbáturin eigur næstbestu tíðina, sum teir fingu í 2001.

Umframt at samanbera tíðir, er eisini gjørt eitt yvirlit yvir, hvussu nógv tey einstøku róðrarfeløgini hava vunnið av heiðursmerkjum hesi gott og væl tríati árini, sum eru skrásett í hagtalsgrunninum. Ikki óvæntað er Havnar Róðrarfelag nógv mest vinnandi felagið við 251 gullheiðursmerkjum, meðan nummar tvey er Hvalvíkar-Streymnesar Róðrarfelag við 84 gullheiðursmerkjum.

Sum nakað heilt forkunnugt hava stigtakararnir til hagtalsgrunnin eisini gjørt eitt yvirlit, har tað ber til at síggja, hvussu nógva tíð teir einstøku bátarnir hava brúkt upp á teir seks róðrarnar higartil í ár. Her kann til dømis staðfestast, at hóast gentumanningin á Sílinum hevur fýra stig fleiri enn manningin á Bliki undan ólavsøkuróðrinum, so hevur Blikamanningin róð teir seks róðr-arnar samanlagt eitt hálvt sekund skjótari enn tær umborð á Sílinum.

Stigtakararnir til hagtalsgrunnin vóna og vænta, at nógv róðraráhugað fólk fara at fáa stóra gleði av hagtølunum, sum altso eru at finna á heimasíðuni hjá Havnar Róðrarfelag, www.drekin.fo.


J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo

WWW.SMYRIL-LINE.COM





Bilur + 2 fólk til Danmarkar
úr 2.720,-

**Føroyar – Danmark** ella hinvegin
Tórshavn – Hanstholm ella hinvegin

| Lágárstíð | Couchettir | 4-koyggjukamar, inn | 4-koyggjukamar, utt. | 3-koyggjukamar, inn. | 3-koyggjukamar, utt. | 2-koyggjukamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 2.720 | 3.200 | - | - | - | 4.320 |
| Bilur + 3 fólk | 3.580 | 4.300 | - | 5.110 | 5.530 | - |
| Bilur + 4 fólk | 4.440 | 5.400 | 6.080 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 5.300 | 6.500 | - | - | - | - |

| Háárstíð | Couchettir | 4-koyggjukamar, inn. | 4-koyggjukamar, utt. | 3-koyggjukamar, inn. | 3-koyggjukamar, utt. | 2-koyggjukamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 3.720 | 4.160 | - | - | - | 5.800 |
| Bilur + 3 fólk | 4.780 | 5.440 | - | 6.820 | 7.420 | - |
| Bilur + 4 fólk | 5.840 | 6.720 | 7.560 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 6.900 | 8.000 | - | - | - | - |

Bilur + 2 fólk til Noregs
úr 1.960,-

**Føroyar – Noreg** ella hinvegin
Tórshavn – Bergen ella hinvegin

| Lágárstíð | Couchettir | 4-koyggjukamar, inn. | 4-koyggjukamar, utt. | 3-koyggjukamar, inn. | 3-koyggjukamar, utt. | 2-koyggjukamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 1.960 | 2.280 | - | - | - | 2.920 |
| Bilur + 3 fólk | 2.640 | 3.120 | - | 3.600 | 3.840 | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.320 | 3.960 | 4.440 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 4.000 | 4.800 | - | - | - | - |

| Háárstíð | Couchettir | 4-koyggjukamar, inn. | 4-koyggjukamar, utt. | 3-koyggjukamar, inn. | 3-koyggjukamar, utt. | 2-koyggjukamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 2.480 | 2.960 | - | - | - | 3.760 |
| Bilur + 3 fólk | 3.300 | 4.020 | - | 4.620 | 5.100 | - |
| Bilur + 4 fólk | 4.120 | 5.080 | 5.720 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 4.940 | 6.140 | - | - | - | - |

Bilur + 2 fólk til Hetlands
úr 1.420,-

**Føroyar – Hetland** ella hinvegin
Tórshavn – Lerwick ella hinvegin

| Lágárstíð | Couchettir | 4-koyggjukamar, inn. | 4-koyggjukamar, utt. | 3-koyggjukamar, inn. | 3-koyggjukamar, utt. | 2-koyggjukamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 1.420 | 1.710 | - | - | - | 2.240 |
| Bilur + 3 fólk | 1.860 | 2.295 | - | 2.715 | 2.970 | |
| Bilur + 4 fólk | 2.300 | 2.880 | 3.280 | - | - | 3.940 |
| Bilur + 5 fólk | 2.740 | 3.465 | - | - | - | - |

| Háárstíð | Couchettir | 4-koyggjukamar, inn. | 4-koyggjukamar, utt. | 3-koyggjukamar, inn. | 3-koyggjukamar, utt. | 2-koyggjukamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 1.880 | 2.240 | - | - | - | 2.900 |
| Bilur + 3 fólk | 2.460 | 3.000 | - | 3.480 | 3.810 | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.040 | 3.760 | 4.160 | - | - | 5.080 |
| Bilur + 5 fólk | 3.620 | 4.520 | - | - | - | - |

Bilur + 2 fólk til Íslands
úr 2.330,-

**Føroyar – Ísland** ella hinvegin
Tórshavn – Seyðisfjörður ella hinvegin

| Lágárstíð | Couchettir | 4-koyggjukamar, inn. | 4-koyggjukamar, utt. | 3-koyggjukamar, inn. | 3-koyggjukamar, utt. | 2-koyggjukamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 2.330 | 2.650 | - | - | - | 3.530 |
| Bilur + 3 fólk | 3.045 | 3.525 | - | 4.185 | 4.545 | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.760 | 4.400 | 4.960 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 4.475 | 5.275 | - | - | - | - |

| Háárstíð | Couchettir | 4-koyggjukamar, inn. | 4-koyggjukamar, utt. | 3-koyggjukamar, inn. | 3-koyggjukamar, utt. | 2-koyggjukamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 3.080 | 3.440 | - | - | - | 4.640 |
| Bilur + 3 fólk | 4.020 | 4.560 | - | 5.460 | 5.940 | - |
| Bilur + 4 fólk | 4.960 | 5.680 | 6.480 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 5.900 | 6.800 | - | - | - | - |

Prísirnir í lágárstíð eru galdandi fyri 1 persónbil (upp til 7,0 m longd og 2,5 m hædd) og valda talið av ferðandi annan vegin.
Børn yngri enn 6 ár, ið ikki hava egna koyggju, ferðast ókeypis.

Prísirnir í háárstíð eru galdandi fyri 1 persónbil (upp til 5,0 m longd og 1,9 m hædd) og valda talið av ferðandi annan vegin.
Børn yngri enn 6 ár, ið ikki hava egna koyggju, ferðast ókeypis.

SMYRIL LINE